# JÓLAPRÝÐI



LMS

Nú jólini eru í hondum, er tíð at gera smálutir til pynt og gávur. Kanska tú hevur hug at nýta okkurt av hesum hugskotum til hjørtu og kramarhús.



1. Tøv eitt stykki - ikki tjúkt. Tú kanst leggja tvey 2-3 løg av karðaðari ull. Tað riggar væl at nýta ein náturulit og leggja tilvildarligt mynstur við t.d. reyðum ella grønum. Klipp kramarhús og/ella hjørtu úr tí tøvda og seyma saman í hond ella maskinu. Kanturin kann vera, sum hann er ella pyntast við broderistingum ella bandi. Honk verður klipt úr tí tøvda stykkinum, kantibandinum, ella hon verður flættað ella knýtt.

2. Tøv eitt tunt hvítt stykki. Klipp kramarhús/hjørtu og brodera pynt á, áðrenn tú seymar saman í hond ella maskinu. Knýt, bregda ella flætta honk.

3. Finn vakrar toylepar. Klipp kramarhús/hjørtu. Kanta við skrábandi og seyma saman í maskinu. Set smalar bendlar ella onnur bond í til honk.

4. Klipp kramarhús/hjørtu úr strúkiviseline (vieltexit). Strúk á toylepar, klipp út og pynta kramarhúsið/hjartað við borderarí, maskinbroderarí ella áseyming (applikatión), áðrenn tú seymar saman og setur honk í.

5. Prenta ella mála við stofflitum á hvítt toy og seyma kramarhús ella hjørtu.

6. Seyma smáar toylepar saman (patch-word) til eitt stykki. Strúk væl. Klipp kramarhús og/ella hjørtu burturúr stykkinum. Falda kantin ella kanta við bandi ella kanska við tøttum zig-zag stingum ella onkrum pyntiseymi. Seyma saman og set honk í.

Ivaleyst hevur tú fleiri hugskot.



Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# PRÝÐING

Nøkur dømi um, hvussu tú kanst prýða

kramarhús
hjørtu
eskjur
krukkur
vættraklæði og einglakjólar
jólakort
til-og-frá-kort
pappír
o.a.m.

1. tekna á pappír
2. mála pappír
3. líma pappír á pappír
4. klipp myndir og líma á
5. líma grøs og turkaðar plantur á
6. ger pappírsbatikk
7. brúka innpakkingarpappír
8. strúk fileksit á klæði og líma ella seyma saman
9. seyma myndir á klæði (áseyming og íseyming)
10. tekna við seymimaskinu
11. mála klæði
12. prenta á pappír ella klæði
13. evna kramarhús úr leiri.

Henkurnar kunnu klippast úr pappíri, seymast úr toystrimlum ella bondum ella flættast, bregdast, knýtast ella annað.

Onnur uppskot:
Tekna eina jólasøgu á eina røð av kramarhúsum ella hjørtum. Vend kramarhúsum øvut og ger so jólatrø, einglar, vættrar, dukkur o.a.

Pappírsbatikk er vakurt, eisini tá ljós skínur ígjøgnum og er tí fínt til vindeygapynt og lampur.

Ger tær eskju at goyma pappírsrestir, toylepar, bond o.a. í. So eigur tú tilfar til mangt og hvat, tá tú næstu ferð skalt gera myndir ella pynt.

Gakk túrar og finn ymiskt í náttúruni at brúka beinleiðis ella til at tekna eftir.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# KRAMARHÚS

Eitt kramarhús kanst tú evna um fingrarnar, sum handilsfólk plagdu at gera, ella tú teknar ein runding við passara ella um okkurt runt í tí støðd, sum tær dámar.

Klipp rundingin í helvt, og tú hevur til tvey kramarhús, sum á mynd 1

ella klipp sum mynd 2 vísir.

Tú kanst eisini brúka 3 til mynstur at klippa eftir.










Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# KRAMARHÚS




Mynstrini kunnu teknast á papp og klippast út. So eru tey lættari hjá børninum at tekna av.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu

## KRAMARHÚS



Hevur tú hug at brodera á kramarhúsið, eigur tú at gera tað, áðrenn tú seymar ella límar tað saman.

Egnaðir stingir eru t.d. hesir:



Konturstingur



Knútar



Ketustingur

Strúk vielexit-kramarhúsið á klæði - og minst til seymrúm, tá ið tú klippir (3/4 cm).
Zig-zagga kantarnar ella kanta við skrábandi.
Seyma saman á ranguni við maskinu ella í hond.

Vend og seyma honk í.
Honkin kann gerast úr sama klæði, úr skrábandi ella øðrum bandi.



Skipað: Súsan í Jákupsstovu

## KRAMARHÚSVÆTTRAR



Vielexit-síðan við kramarhúsum verður strokin á klæði.

Hár verður sett á høvdið t.d.

soleiðis



ella soleiðis



Skegg kann eisini festast undir høkuna.
Andlit kunnu teknast á ella broderast við somu stingum, sum vístir eru á kramarhúsunum.

Kramarhúsini verða klipt út, men **minst** til seym.

Vættrarnir seymar tú saman á ranguni, og kanska tú kantar í neðra á maskinu við zig-zag-stingum ella í hond við tungustingum.



Tungustingir

## TRØLL



Klipp 2 kramarhús við seymrúmi.
Seyma eitt andlit á annað. Til tað finnur tú onkran lepa og áseymar.

Kramarhúsini verða løgd saman - rætta móti rættu - og seyma verður allan vegin runt. Bert skal eitt op vera at venda ígjøgnum og fylla í.

Vend og fyll ull, vatt ella polyestervatt í. Seyma opið aftur og set hár, skegg og hala á, sum tær lystir.

## DUKKA



Dukkan verður seymað sum trøllið, bert vit tí muni, at tú afturat klippir 4 stykki, sum tú seymar til armar og bein, fyllir og setur á kroppin.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# VÆTTUR ÚR „DUKKULAPPUM“



1. Klipp 2 rundingar úr filti ella toylepum til høvd og kropp, 1 lítlan runding til nøs og 1 avlangt petti til armar.
2. Set rykkitráð í, sum tekningin vísir.
3. Fyll ull í, rykk samanum og seyma høvdið á kroppin.
4. Seyma eygu í og nøsina á høvdið.
5. Seyma armarnar og seyma teir á kroppin.
6. Seyma ull ella tógvhár á.
7. Seyma eina húgvu úr einum hálvum toyrundingi.




Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# FLÆTTU-DUKKA ella VÆTTUR




Flætta eina flættu og surra tráð fyri endarnar til armar og bein - uml. 1:2 (nýtir tú 2 tr. føroyskt tógv, er passaligt at hava 12 træðrir (3x4 tr.) og hava uml. 15 cm til armar og uml. 30 cm til bein)

Set saman sum tekningin vísir:



1. Set armar og bein saman
2. Bregda tráð um og
3. seyma tráðin upp ígjøgnum høvdið (vattkúla, tøvt høvd ella træperla).
4. Seyma kroppin saman við sama tráði, sum flættað er við.
5. Tekna andlit við tushblýanti.



Tá ið dukkan er liðug, ber til at gera vættrahúgvu, hár og klæði til dukkuna.



Í staðin fyri at surra tráð um endarnar ber til at nýta knút ella perlu til hendur og føtur.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# EINGIL



Strúk kramarhúsformin á klæði og klipp við seymrúmi.
Klipp vielexit-veingirnar út og brúka teir, sum teir eru ella tað, sum betur er: strúk teir á tað fína klæðið.

Kramarhúsið verður seymað saman á ranguni, men fyrst verða veingirnir settir inn í rivuna.



Vend kramarhúsinum.

Høvdið - ein vattkúla ella stór træperla. Hár kann festast á høvdið. Gloria - ein messingringur, gullpappír ella annað kann setast á.



Eingilin kanst tú pynta meira, sum tú hevur hug til við blondum, andliti ella øðrum.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu

## VÆTTUR ella KLOVNUR



Vielexit-kramarhúsið verður strokið á klæði.
Klipt verður við seymrúmi.
Seymað verður saman á ranguni.
Skjúrtið/kroppurin verður vent á rættuna.
Ein vattkúla verður seymað føst.
Seyma eitt lítið kramarhús sum tað stóra og set tað á høvdið. Eygu kunnu teknast ella límast á, og nøsin kann t.d. vera ein træperla.



Tú kanst eisini gera høvd úr klæði og fylla tað soleiðis:
Klipp ein running og fyll hann við ull ella vatti, rykk kantin saman við einum tráði og seyma so høvdið fast. Tú kanst klippa oddin av kramarhúsinum, so „hálsurin“ sleppur niðurí.



Skipað: Súsan í Jákupsstovu

# GANDADEIGGJ



2 koppar av mjøli

1 kopp av salti

3/4 kopp av vatni

Tilfarið verður elt saman. Er deiggið ov bleytt, skal eitt sindur meira av mjøli til, og er tað ov hart, verður ein dropi av vatni latin í aftrat. Hetta deiggið er sera lætt at evna.

Mynda dukkur, smúkkur, vættrar, ljósastakar ella hvat tær hóvar. Tað, sum ikki er meira enn 1 cm tjúkt, kan leggjast á plátu beinanvegin og bakast í ovni 75-125 stig, til tað er passaliga hart.

Tjúkkari lutir eiga helst at torna nakað, áðrenn teir verða bakaðir.

Pynt kann leggjast á - formað beint í hondunum ella kroyst ígjøgnum t.d. hvítleykspressu. Mynstur kann eisini gerast við gafli, kleynuspora o.ø. Deiggið kann litast við fruktliti.

Tá bakað er, skal myndin helst lakkast fyri at halda betur. Alt lakk kann brúkast. Hugsa bara um at fáa lakk, sum ikki er skaðiligt at anda í seg.

Myndirnar kunnu málast, áðrenn tær verða lakkaðar. Til ber eisini at nýta akryl - ella lakk-litir.

Gert tú sprellimenn, smúkkur o.l. jólapynt, sum skal heingjast upp, so minst til, at hol skulu gerast, áðrenn bakað verður.

Stuttligast er sjálv/ur at flætta ella knýta tey bond, sum skulu til.

Skipað: Súsan í Jákupsstovu